## Ísland yvirtekur hotell

Um nakrar fáar vikur verður íslendska ríkið hotelleigari. Jyllandsposturin skrivar, at íslendska ríkið skal yvirtaka tað kenda marglætishotellið D'Angleterre á Kongens Nytorv í Keypmannahavn. Íslendska felagið Nordic Partners, sum keypti hotellið í 2007, hevur tingast við avtøkunevndina hjá Landsbankanum, og formaðurin í nevndini, Páll Benediktsson, sigur við Jyllandspostin, at bankin fer at yvirtaka hotellið um stutta tíð. Hann leggur afturat, at hvørki Landsbankinn ella avtøkufelagið ætla sær at reka hotell, og tí verður tað selt.



# Blanka silvurið gevur seg rættiliga til kennar

**Í mong ár var eingin veiða eftir norðhavssild, sum vit plagdu at rópa hana. Sildin var at kalla burtur og uppfiskað. Fiskiskapur eftir blanka silvurinum varð steðgaður, men nú mong ár eftir er líkt til, at stovnurin rættiliga er komin fyri seg aftur, og skipini hava rokveiði, samstundis sum matmarknaðurin partvís er sprongdur**

SILD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Blanka silvurin hevur stóran týdning fyri pelagisku skipini og tess manningar. Bert spell, at hesin feski fiskur, sum verður veiddur upp á lítla og onga tíð, ikki allur fer til matna*



*Hetta er triði túrurin hjá Fagrabergi í ár. Hin fyrsti var ein svartkjaftatúrur, og hesar báðar seinnu hevur skipið verið á sildaveiði*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Skipini, sum royna eftir sild, hava í seinastuni havt rættiliga góðan fiskiskap. Tað er serliga út fyri Lofoten í Noreg, at skipini hava havt rokveiði.

Í gjáramorgunin kom føroyska skipið Fagraberg til Hanstholm við umleið 2500 tonsum av sild, sum teir fingu í einar 12 til 16 tímar uppi við Lofoten. Hetta er norðhavssild, sum vit plagdu at rópa hana.

### Alt til ídnað

Anfinn Olsen, reiðari, sigur, at rættiliga nógv sild er á marknaðinum í løtuni, og tí fer øll veiðan hjá Fagrabergi hesaferð til ídnað.

- Tað er smekkfult av sild at fáa, serliga uppi við Lofoten, men eisini í Norðsjónum og í Eystursjónum.

Reiðarin sigur, at lastin hjá Fagrabergi varð bjóðað út um pelagisku uppboðssøluna hjá Sildelaget í Noreg.

- Vit fingu fleiri boð upp á lastina, og Havsbrún í Fuglafirði bjóðaði eisini.

Anfinn Olsen sigur, at teir fáa umleið 2,30 norskar krónur fyri kilo fyri sildina til ídnað í Hanstholm – alt eftir, hvussu hon er til lýsi og proteinir.

### Sølan setir met

Heimasíðan hjá Sildelaget í Noreg skrivar, at lastin hjá Fagrabergi er største sildalast, sum nakrantíð er fráboðað uppboðssøluni.

Sildelaget, sum er ein uppboðssøla fyri pelagisk fiskasløg, sigur annars, at tey ongantíð havt selt so nógv sild, sum í farnu viku, tá samlaða nøgdin var sløk 100.000 tons – ella eini 8.000 tons fleiri enn gamla viku-metið sum er frá 2008.

Tølini hjá Sildelaget í Noregi benda á, at rættilig gongd er í veiðini eftir norðhavssild í løtuni og skipini, sum eru á hesi veiði, hava í seinastuni gjørt rættiliga góðar túrar.

Tað er bara spell, at hesin góði fiskur, sum verður veiddur upp á so stutta tíð, og tí er púrasta feskur, ikki skal fara til matvøruframleiðslu.

Men, hetta sum so mangt annað, ið hevur við handil at gera, er ein spurningur um útboð og eftirspurning – og kanska eisini um framleiðsluorku, frystiorku og fíggjarorku.

### Triði túrur í ár

Anfinn Olsen, reiðari, sigur, at enn er ikki endaliga

# Hýsa góðan prís á marknaðinum í dag

**Nøgdirnar av hýsu, tá Fiskamarknaður Føroya seldi í morgun, vóru ikki stórar, men prísirnir vóru heilt aðrir, enn vit hava sæð í seinastuni**

FISKAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar hevur nógv verið frammi um, at hýsa veidd undir Føroyum hevur havt so lágan prís í seinastuni.

Orsøkin er, at okkara hýsumarknaður er í Bretlandi, og har vilja handilsketurnar ikki longur hava føroyska hýsu í sínum útboði, tí mett verður ikki, at hýsuveiðan undir Føroyum er burðardygg.

At kalla øll hýsa, sum er veidd undir Føroyum, er tí farin óvirkað av landinum til smákeyparar, har ikki kann roknast við støðugum og góðum prísi.

Við virking og sølu av frystum fiskavørum kunnu langtíðaravtalur gerast, har prísurin hugsandi eisini er meiri støðugur yvir eina tíð.

### Betri prísir

Tá Fiskamarknaður Føroya hevði sína regluligu sølu í morgun, seldi marknaðurin stívliga 8 tons av hýsu. Hetta eru ikki stórar nøgdir, men samlaða sølan í morgun var heldur ikki so stór, stívliga 63 tons.

Størstu nøgdirnar av hýsu, vóru hýsa 2. Talan var um tilsamans 5,7 tons, sum fóru fyri miðalprísin 12,79 krónur fyri kilo.

Sløk 800 pund vóru av hýsu 1, og her var miðalprísurin 16,70 krónur fyri kilo, sum er rímiliga góður hýsuprísur - og í øllum førum nógv betri prísur, enn vit hava sæð seinastu tíðina.

Góð 2 tons vóru eisini av hýsu 3, sum fór fyri miðalprísin 12,90 krónur fyri kilo.

### Toskur støðugur

Eini 20 tons av toski vórðu í morgun seld um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya.

Størstu nøgdirnar vóru av toski 3 og toski 4, sum fóru fyri miðalprísin 15,84 og 11,81 krónur fyri kilo.

Av hesum sæst, at prísirnir fyri hýsu 3 í dag vóru betri enn prísirnir fyri tosk 4.

Besti miðalprísur fyri tosk, var fyri tosk 1, sum fór fyri 27,20 krónur fyri kilo, men talan var bert um góð 3.000 pund av bestu toskastøddini.

Góð 3,4 tons vóru av toski 2, sum fór fyri miðalprísin 25,75 krónur fyri kilo.

Tilsamans seldi Fiskamarknaður Føroya í dag sløk 64 tons fyri 990.000 krónur.